

*Týsdagin arbeiddu tey smáan upsa á Sandi. Henda dagin vóru tey bert 12 til arbeiðis*

### Tons vanta

Sandoy Seafood stendur nú yvir fyri nýggjum avbjóðingum, nú tveir av stuðlum teirra – trolararnir Columbus og Nornagestur – eru seldir av oynni.

Sambært upplýsingum, sum áður hava verið frammi, so landaðu teir í fjør eini 3.500 tons til virkið á Sandi.

- Tað kemur sjálvandi at merkjast her, um vit ikki fáa fatur á hesum tonsunum aðrastaðni frá, sigur Harry.

Sjálvur veit hann ikki um nakrar ætlanir at útvega aðrar bátar til bygdina.

- Men vit koma so bara at bjóða uppá hvønn einasta stert, eisini í tíðini framyvir, sigur hann.

# Bjóða framvegis upp á hvønn einasta stert

**Týsdagin var ikki nógv fiskaarbeiði hjá Sandoy Seafood á Sandi. Bert 12 fólk vóru til arbeiðis, men onkutíð eru tey munandi fleiri – heili 40 í tali**

FISKIVINNA
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Sandur:** Tað er sera friðarligt á havnalagnum henda morgunin.

Nakrir menn standa og práta, og frammanfyri virkið liggur ein einstakur útróðrarbátur. Ein maður er júst farin í land hagani, men einki sæst kortini til nakran fisk.

Aðrastaðni í havnalagnum eru fleiri tóm bátapláss, helst tí at menn eru farnir eftir havhestaungum.

Inni á virkinum hjá Sandoy Seafood hoyrist ikki eitt ljóð. Her eru so ongar maskinur í gongd, men hurðin er opin innar á virkið.

Her inni síggjast nøkur fólk vera til arbeiðis henda morgunin. Eini 12 í tali, teirra millum formaðurin, Harry Hentze.

- Hetta er ikki tað mesta av arbeiðsfólki. Vit kunnu onkutíð verða heilt upp ímóti teimum 40, sigur hann.

### Bjóða uppá fiskin

Týsmorgunin í hesi vikuni vóru tey 12 fólkini á virkinum í ferð við at flekja smáan upsa.

Hetta var fiskur, tey høvdu fingið frá Columbusi, Nornagesti og Eysturbúgvanum, sum allir høvdu lagt veiðuna upp her seinast í farnu viku.

- Í løtuni er ikki tað nógva arbeiðið. Vit arbeiða henda dagin aftrat og so út á fyrrapartin í morgin. Tá man hetta verða liðugt, sigur hann.

Teir bjóða uppá fiskin umvegis uppboðssøluna eins og onnur virki. Men fáa eisini fisk frá útróðrarbátum.

- Um vit hava nakran møguleika mótvegis øðrum virkjum?! Jú, tað hevur gingið higartil.

- Og tað rokni eg bara við, at tað kemur at gera eisini í framtíðini, sigur Harry Hentze.



*Sandoy Seafood hevur fingið nógvan fisk frá tveimum av trolarunum, sum nú eru farnir av bygdini. Nú mugu tey mest dúva uppá uppboðssølu og útróðrarfisk*

## 35 ár við B71

**Við tiltøkum í Havn og á Sandi fer hetta kenda fótbóltsfelagið at hátíðarhalda 35 ára dagin**

JUBILEUM
*Snorri Brend*

**Sandur:** Hetta hátíðarhaldið verður gjørt við tiltøkum bæði heima á Sandi og í Havnini. Endamálið er sjálvandi at savna inn pening, men eisini fyri at vísa á, at hóast tey vóru fament á Sandoynni fyri 35 árum síðani, so megnaðu tey kortini at savna seg saman um eitt fótbóltslið, sum fólk skjótt fingu virðing fyri.

Í samband við dagin er serstakt B71-tiltak á torginum í SMS, har mangt og hvat er á skránni.

Millum tey mongu tiltøkini á torginum er ein framsýning av gomlum myndum, eins og høvið verður at síggja gamlar video-upptøkur.

Leygardagin verður eisini eitt serstakt høvi at ogna sær okkurt listarverkið. Tá verður nevniliga eitt uppboð, sum tingmaðurin Torbjørn Jacobsen fer at skipa fyri.

Heima á Sandi skal hesin dagurin eisini markerast, og seinnapartin í morgin verður ein forvitnisligur dystur leiktur millum tað liðið sum gjørdist FM-vinnari í 1989 og 2. deildarliðið, sum nú roynir sítt ítarsta at koma upp aftur í bestu mansdeildina.

Tað ljóðar kanska eitt sindur øvugt, at eitt felag sum í navninum sigur seg hava 34 ár á baki, kann hátíðarhalda 35 ára dagin.

Veruleikin er tann, at felagið varð stovnað 1. januar 1970 og æt tá snøgt sagt Sand. Men tá Meginskúlin á Sandi kom varð alt virksemið líkasum savnað á hesum staði, og tí fekk felagið árið eftir sítt núverandi navn B71, sum eisini liggur væl á tunguni.